HEILSANIR

Vit ynskja at takka øllum, sum á ymiskan hátt róru við til at gleða okkum á hjúnabandsdegnum 4. mai 2002.
Marjun og Einar

Góða, elskaða Kristina
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 22. sept. Alt tað besta í framtíðini ynskja
fastir og Halldórur

Góði Magnus
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum. Alt tað besta ynskja
Jóhan Herman, mostir og Jón Brian

Góða, elskaða mamma
Hjartaliga tillukku við 29 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
Heilsan, Allan og Turið

Góða Kristina
Lukku og gleði á tínum 2 ára degi. Alt tað besta. Abbi elskar teg.
Heilsan, abbi á Sandi

Góða, fitta Kristina
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Alt tað besta verður ynskt tær frá
fastur og Høgna

Góði Magnus
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini ynskja
Eir, Rói og Nikolina

Góði elskaði Kristian!!
Hjartaliga til lukku við 1 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
Ynskja mamma og babba

Góða, allarbesta Lív xxx
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Vit elska teg.
Omma, abbi og mostir

Góða, elskaða dóttir og systir
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
Heilsan, mamma, pabba og Allan

Góði Jón
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum ynskja
omma og abbi í Porkeri

Góða, elskaða Kristina
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum, sum var 22. sept. Alt tað besta í framtíðini ynskja
omma og abbi

Góða, fitta Turið
Hjartaliga tillukku á 2 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Eisini ein heilsan til mammu tína.
Kærar heilsanir frá ommu og abba í Hvalba

Góða, elskaða Sigvør
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 27. sept. Nú síggjast vit skjótt aftur.
Kærastu heilsanir, gumman og Svein

Góði, fitti Kristian!!
Hjartaliga til lukku við tínum 1 ára degi. Alt tað besta framyvir, ynski eg tær
Petur Martin

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 23. sept.:
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 24. sept.:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 **Vit syngja.** Flemming og Benny Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát um tann føroyska bátin, Óli Mikkelsen
Mikudagin 25. sept.:
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Framsýningin í Brekkutúni í Hoyvík **Úr útlegd**
Hósdagin 26. sept.:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Vaska og lita vit før. ull. Ása Hátún og heimildarfólk úr Kvívík. Tilm. 316491
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 27. sept.:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingeoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21.00 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Vika 39 – 25. sept.
Vinnaratøl: **11 - 23 - 27 - 34 - 38 - 48**

Eykatøl: **19 - 45**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+ eykatal	**118.827,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.593,- kr.**
4 vinnaratøl:	**115,- kr.**
3 vinnaratøl:	**39,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VALUTAKURSIR

		25.09.02	Ultimo august
USA	**Dollarar**	760,1300	755,6800
Bretland	**Pund**	1184,3700	1160,4400
Svoriki	**Króna**	81,5900	81,0900
Noreg	**Króna**	101,5400	100,4600
Sveits	**Frankur**	507,1500	504,5200
Ísland	**Króna**	8,7000	8,4900
Kanada	**Dollari**	479,3300	485,0500
Japan	**Yen**	6,1898	6,3900
	Evra	742,7200	742,5300

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Kai Vágfjall
Postrúm 3250
110 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SERSKØLTAR

S	A	L	V	A	D	O	R	A	L	L	E	N	D	E	
T	R	E	Í	S	K	N	Í		Æ		Í	R	Í	A	N
A	M	E	R	Í	K	A	N	A	R	A	R		G		A
T	S		K	A			K	R	A	D	D	A	R	Í	N
S	V	E	Í	S	A	R	U	M		N	Ø	R	A	S	T
L	E		N	T		A	S	E	A		M	E	N	T	U
E	Í	K		A	L		T	N		D	Í	N		A	C
Y	G		E	T	A		E	Í	R	A		D	U	N	K
S	G		R	U	S	S	Í	A		R	E	A		B	E
T	Í	M	O	R		Ø	N		A	T	O	L		U	T
E	N		T		A	T	A		E	M	S		A	L	
Ó	G	V	Í	N		U	R		R	O		Í	N		O
L	A		K	Y	R	R		Z	O	O	L	O	G	U	R
K	R	U	K	K	A		Z	E	B	R	A		A	R	K
313		L			K	A	Í	N			T	A	R	N	A
T	A	L	E	B	A	N	A	N	Í	R		S	A	A	R

Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

314

Loysunarorðið: .....
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Póra Póroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt